## Jan hevur góða tíð

Sitandi borgarstjórið í Tórshavnar kommunu, Jan Christiansen, sigur seg ikki hava skund at kalla nýggja býráðið í Tórshavnar kommunu saman. Hann vísir á, at enn vantar býráðnum tveir regluligar fundir, og teir ætlar hann at hava.

– Eg havi til nýggjárs at kalla býráðið saman, og um einki óvæntað hendur, so verður býráðið ikki kalla saman fyrr enn millum jól og nýggjárs, sigur Jan Christiansen í stuttari viðmerking.

**-páll**

## Endurtaka áheitanina

Vegna nýggju býráðslimirnar í Tórshavnar kommunu hevur komandi borgarstjórin, Heðin Mortensen sent Jan Christiansen enn eina áheita um at kalla nýggja býráðið saman

Skrivið er soleiðis orðað:

Vísandi til skriv, dagfest í Tórshavn tann 12. november, vilja vit sjey limir í nývalda býráðnum, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov, endurtaka áheitan okkara á teg, sum fyrst valda býráðslim, um sum skjótast at kalla býráðið saman at skipa seg.

Síðani vit sendu fyrra skrivið, hava vit ikki fingið nakra innkalling til fund, og ei held-ur hava vit fingið nakað svar til áheitan okkara. Tí kenna vit okkum noydd til enn eina ferð at minna á hesa áheitan.

Vit halda onga orsøk vera at bíða við hesum fundi, tí vit sjey eru endaliga samd um at skipa nýggja býráðssamgongu. Somuleiðis hevði tað lætt munandi um hjá býráðs-umsitingini, at hon sum skjótast fekk at vita, hvussu býráðið verður skipað við nevndum, formonnum og øðrum eftir 1. januar 2005.

# Heldur fast um beinleiðis valið

**Komandi borgarstjórin í Tórshavnar býráð, Heðin Mortensen, heldur fast um, at borgarstjórin í Tórshavnar kommunu skuldi verði valdur á beinleiðis vali. – Borgarstjórasessurin er altíð kjarnan í stríðnum, sum tekur seg upp á hvørjum býráðsvali í Havn, og hesin trupulleiki varð loystur við at velja hann beinleiðis, heldur Heðin Mortensen**

BÝRÁÐSÓSKIL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Tað ber snøgt sagt ikki til at taka hvønn annan í eið í politikki. Ein kendur maður segði einaferð, at "du har et standpunkt indtil du har et andet", og hetta er í stóran mun galdandi í politikki. Tað er ómetaliga torført at binda hvønn annan niður, tí spælireglurnar í politikki eru einaferð so at nærum alt ber til, sigur Heðin Mortensen*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Komandi borgarstjórin í Tórshavnar kommunu hevur sitið í Tórshavnar býráð síðan 1972. Heðin Mortensen sigur seg minnast, at tað nærum á hvørjum býráðsvali í Havn hevur verið stríð og óskil í samband við borgarstjórasessin og býráðssamgongur. Uppskotið hjá Heðini fyri at koma hesum ódámliga stríði til lívs er at velja borgarstjórin í Havn á beinleiðis vali.

– Eg havi havt hendan tankan áður, og eg haldi framvegis at hann er hin besta loysnin. Tað hevur víst seg, at borgarstjórasessurin er altíð kjarnan í stríðnum, sum tekur seg upp á hvørjum býráðsvali í Havn, og hesin trupulleiki varð loystur við at velja hann beinleiðis, heldur Heðin Mortensen.

Hann ásannar, at vandin vil altíð verða fyri, at borgarstjórin brádliga endar í minniluta í tí býráðið, hann einaferð er settur at stjórna, men heldur kortini ikki, at tað er ein stórvegis trupulleiki.

– Jens Marius Poulsen segði tað so væl í Dimmalætting, tá hann vísti á, at tað er siðvenja í Havn, at tá stór mál eru fyri, so standa allir býráðslimir saman, tí hvør teirra vil tað besta fyri kommununa. Tí haldi eg ikki tað er nøkur vanlukku um um valdi borgarstjórin kann enda í minniluta, vísir komandi borgarstjórin í Tórshavnar kommunu á.

### Framhaldandi sundurbýtt

Samfelagsfrøðingurin, Jógvan Mørkøre, vísti í Sosialinum týsdagin á, at hann metti tað verða skilabest um bý- og bygdarráðini gingu burtur frá at býta seg í meir- og minniluta. Heðin Mortensen væntar ikki, at hetta verður ein framtíðarleistur í Tórshavnar býráð.

– Tað er ikki eydnast áður at fáa eitt býráð, sum ikki er býtt sundur í meir- og minniluta, og satt at siga trúgvi eg ikki rættiliga upp á tað. Hesin hugsunarháttur gongur møguliga á smærru støðunum, men ikki í Havn, tí her eru so nógvir býráðslimir, heldur Heðin Mortensen

Komandi borgarstjórin trýr heldur ikki upp á, at tað ber til at fáa partarnir í býráðnum at taka hvønn annan í eið fyri at fáa samgongusamráðingar í fastari karmar.

– Tað ber snøgt sagt ikki til at taka hvønn annan í eið í politikki. Ein kendur maður segði einaferð, at "du har et standpunkt indtil du har et andet", og hetta er í stóran mun galdandi í politikki. Tað er tí ómetaliga torført at binda hvønn annan niður, tí spælireglurnar í politikki eru einaferð so, at nærum alt ber til, sigur Heðin Mortensen.

Spurdur um samráðingartilgongdin skuldi verið fest fast við lóg, svarar Heðin Mortensen, at tað kundi verið ein máti, at fingið viðurskiftini betur skipað viðurskiftini.

# Onga patent loysn

**Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Jan Christiansen, hevur onga ítøkiliga loysn fyri, hvussu vit koma óskilinum í samband við býráðsval í høvuðsstaðnum til lívs. Hann mælir til, at nevndarbygnaðurin í Tórshavnar býráð verður broyttur**

BÝRÁÐSÓSKIL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Jan Christiansen ásannar, at rokið um telvingina at koma í samgongu í Havn seinastu býráðsvalini ikki er ein haldgóð støða-hvørki fyri borgaran ella politikararnar. Hann hevur kortini onga ítøkiliga loysn fyri, hvussu vit fáa samráðingartilgongdina í fastari karmar á komandi býráðsvali.

Í Sosialinum í gjár var viðtala við samfelagsfrøðingin, Jógvan Mørkøre, sum helt, at nú mátti óskilið í samband við býráðsval fáa ein enda. Hann mælti pørtunum til at taka hvønn annan í eið, so at samgongusamráðingarnar verða betri skipaðar í framtíðini.

– Hóast tað er nógv tann besta loysnin, so verður tað ógvuliga trupult at taka hvønn annan í eið og lova hvørjum øðrum, at vit skulu hava samgongusamráðingarnar í fastari karmar. Tað, sum fór fram á valinum hesaferð, var so mikið ódámligt, at tað verður ringt at hava álit á nøkrum. Eg havi í løtuni onga patent loysn fyri, hvussu vit koma víðari, og eg veit ikki, hvussu tú skuldi fingið skipanina í fastari karmar, sigur Jan Christiansen.

Sitandi borgarstjóri vísir aftur, at fullkomiligt óskil hevur valda síðan býráðsvalið í 1996.

– Tað er ikki rætt, at einki skil hevur verið á samgongusamráðingunum síðan 1996. Tað hevur altíð verið vanligt í Havn, at tað verður kjakast aftur og fram um samgongumøguleikar – eisini á náttartíð. Náttartelvingin haldi eg ikki er nakar trupulleiki, men hinvegin er tað ódámligt, at partarnir ikki halda skrivligar avtalur longur, heldur Jan Christiansen.

Jógvan Mørkøre vísti millum annað á, at tað kundi verið skilagott, at latið størsta flokkinum ella listanum á býráðsvalinum initiativið til at skipa samgongu. Hesum er Jan Christiansen samdur í.

– Eg haldi tað ljóðar skilagott at fremsti flokkur fær initiativið, men vansin er kortini altíð, at tað er skjótt, at hinir flokkarnir taka seg saman og skipa samgongu út um tann størsta flokkin, vísir borgarstjórin á.

### Broyta nevndirnar

Hugsunarhátturin við ganga burtur frá at býta bý- og bygdarráðini upp í meir- og minnuluta, tekur Jan Christiansen undir við. Hann heldur, at eitt knútapunkt í hesum spurningi liggur í býtinum av nevndarsessunum í býráðnum. Sitandi borgarstjóri er sannførdur um at rættast hevði verið at broytt nevndar bygnaðin.

– Eg havi fleiri ferðir nevnt, at vit eiga bert at hava tríggjar nevndir pluss havnarnevndina í Tórshavnar býráð. Vit áttu at lagt teknisku, umhvørvið- og heilsu, og byggi- og býarsamskipanar nevndina saman í eina nevnd, meðan trivnaðar, mentanar og sosiala nevndin eisini skuldi verið ein nevnd. Afturat hesum báðum nevndum skuldi verið havnarnevndin og fíggjarnevndin, sum borgarstjórin er sjálvskrivaður í, heldur Jan Christiansen.

Hann vísir á, at einasta orsøk at tað eru sjey nevndir í Tórshavnar býráð í dag er, at talið sjey er júst talið, sum er nóg mikið fyri at fáa meiriluta í býráðnum.



# Telebúð í nýggjum hami

**Telebúðin í Klaksvík hevur longi haltað langt aftan fyri nógvar av hinum búðunum í landinum. Men mánadagin klokkan 13 lat Telebúðin upp í fullkomuliga nýggjum hami, og nú er munur á at koma inn í búðina at avgreiða síni ørindi**

UMBYGGING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Mánadagin kundi økisleiðarin hjá Føroya Tele í Klaksvík, Pól Sundsskarð bjóða viðskiftafólkunum inn til eina umbygda telebúð, sum eftir hansara tykki nú eru fult í tráð við hinar Telebúðirnar kring landið*

**Klaksvík:**
Fyrr var ikki so høgligt at koma inn í Telebúðina. Ein skuldi ígjøgnum ikki færri enn tríggjar hurðar, áðrenn ein kom inn í Telebúðina, og tá vóru hølini ikki serliga tiltalandi.

Men alt tað er nú broytt. Nú skal kundin bert lata eina hurð upp fyri síðani at koma inn í eini flott og hugnalig handilshøli, sum liva fult upp til allar hinar Telebúðirnar í landinum.

– Ja, hetta var hart tiltrongt. Gamla Telebúðin hoyrdi jú heima afturi í steinøldini, segði ein glaður økisleiðari, Pól Sundsskarð.

Hann greiddi frá, at umbyggingin hevði verið ávegis í langa tíð. Allur bygningurin, sum Føroya Tele heldur til í, er farin ígjøgnum eina umfatandi umbygging, sum byrjaði í 2000. Tá varð útbygt fyri okkurt um eina millión krónur, og tá tað var liðugt restaði bert Telebúðin sjálv í.

– Hetta var óluksáliga gott at fáa gjørt. Vit liggja jú í hjartanum í Klaksvík, kann sigast, og tað kemur nógv fólk framvið her hvønn dag, sigur Pól Sundsskarð.

S einni er meiningin eisini, at fólk skulu kunna fara inn í Telebúðina at kanna teirra teldupost. Tað er ein tænasta, sum serliga er hent fyri ókunnugt fólk.

### Alt á einum staði

Eitt annað, sum nú eisini fer at broytast, er avgreiðslan. Sum er, tá ein persónur kemur inn í Telebúðina at skráseta seg, verður alt sent til Havnar. Tað verður ikki longi afturat, sambært Pól Sundsskarð, tí um ársskiftið er ætlanin, at skrásetingar skulu verða avgreiddar á einum og sama staði óansæð hvørjari Telebúð í landinum tú ert staddur í.

Pól Sundsskarð sigur annars, at sølan av fartelefonum nú er stagnerað nakað. Fyrr var tað soleiðis, at tá okkurt nýtt kom fram, komu fólk beinanvegin at spyrja eftir tí, men tað er við at broytast nú.

– Fólk eru meiri prístilvitað nú, og tey eru nøgd við teirra telefonir, letur tað til, sigur Pól Sundsskarð, økisleiðari hjá Føroya Tele í Klaksvík.

Í sambandi við, at Telebúðin lat uppaftur, bjóðaðu tey kaffimunn og hava serlig tilboð hesa vikuna.

# Útoyggjafelagið rósar SL

**Útoyggjafelagið hevur verið við til at gjørt nýggju ferðaætlanina millum Kalsoynna og Klaksvík, og felagið er væl nøgt við framferðarháttin hjá Strandferðsluni**

SAMFERÐSLA
*Eyðun Klakstein*

Strandfaraskip Landsins hava gjørt eitt uppskot um, hvussu ferðaætlanin millum Kalsoynna og Klaksvíkina skal vera, tá ið nýggja ferjulegan á Syðradali verður tikin í nýtslu eftir ársskiftið.

Uppskotið um ferðaætlan er sent út til hoyringar, og tað hevur fingið borgarstjórarnar í Mikladali og í Klaksvík at heita á landsstýrismannin við samferðslumálum um at tryggja farleiðin fleiri pengar, so at kvøldtúrar kunnu gerast partur av ferðaætlanini.

Stjórin á Strandferðsluni, Kristian Davidsen, segði seg í gjár standa eitt sindur spyrjandi, tí Strandferðslan hevur nevniliga gjørt sær stóran ómak við at fáa ynski hjá kallsoyningum við í ferðaætlanina og hevur eisini samstarvað við Útoyggjafelagið um hetta.



*Útoyggjafelagið er væl nøgt við arbeiðsháttin hjá Strandferðsluni, tá ið nýggj ferðaætlan varð gjørd fyri ferðasambandið til og úr Kalsoynni*

### Fyrimyndarligt samstarv

Hetta váttar Útoyggjafelagið eisini í einum tíðindaskrivi, sum tað sendi fjølmiðlunum mánakvøldið.

– Útoyggjafelagið hevur í fyrimyndarligum samstarvi við samferðsludeildina hjá Strandferðsluni arbeitt við at gera eina ferðaætlan fyri siglingina hjá Sam, stendur at lesa í tíðindaskrivinum.

– Úrslitið bleiv, at SL kundi bjóða kalsoyingum fimm túrar hvønn gerandisdag, umframt tveir túrar, har tað verður beinleiðis samband til Leirvíkar. Í vikuskiftinum verða tríggir túrar um dagin, har báturin kemur at í Kalsoynni á túrinum Klaksvík - Lorvík - Klaksvík. Hetta er stórt framstig, í mun til teir tríggjar túrarnar um dagin, sum nú er, heldur Útoyggjafelagið.

### Fjøldin er nøgd

Útoyggjafelagið staðfestir, at nýggja ferðaætlanin ikki ger øllum til vildar, men tað eru orsøkir til avmarkingarnar.

– Tað eru verkligar forðingar, sum í fleiri førum gera, at tað millum annað ikki er beinleiðis samband við bussrutu í Leirvík, umframt trupulleikar á morgni við at náa fyrsta túrin hjá Dúgvuni.

– Manningaskipanin hevur eisini við sær, at ikki ber til at gera ein túr seint á kvøldi uttan munandi eykakostnað, sum SL ikki hevur at ráða yvir í løtuni. Hetta er at harmast um, men allir steinar eru vendir fyri at laga hetta so væl til sum gjørligt.

– Samanumtikið kann staðfestast, at fjøldin í Kalsoynni er væl nøgd við ferðaætlanina, og starvsfólkini á SL, sum hava arbeitt við hesum, eiga rós uppiborið fyri teirra sera fólkaræðiliga arbeiðshátt, sigur Útoyggjafelagið.

## Heðin varugur við trupulleikan

**Heðin Mortensen ætlar sær at fylgja kommunulógini, um hon forðar fyri, at hann kann halda fram í dreymastarvinum sum ítróttarforseti í Føroyum**

FORSETI
*Eyðun Klakstein*

Heðin Mortensen hevur seinastu 24 árini verið yvirhøvd fyri føroyskan ítrótt, og á aðalfundinum hjá Ítróttarsambandi Føroya fyrr í ár, var hann afturvaldur sum forseti fyri næstu tvey árini.

Men nú er líkt til, at tíðin hjá Heðini Mortensen sum oddamaður í føroyskum ítrótti er av.

Kommunulógin forðar eftir øllum at døma fyri, at hann kann hava álitissessin, tí ein fulltíðar borgarstjóri skal ikki hava nakrar ábyrgdaruppgávur, sum ikki hava beinleiðis tilknýti til hansara borgarstjórastarv.

### Aktar lógina

– Tá ið alt er komið upp á pláss við borgarstjórastarvinum, ætli eg mær at tosa við stjórnina í ÍSF fyri at finna fram til, hvat vit skulu gera, sigur Heðin Mortensen.

– Tað hevur verið fantastiskt at verið við í ÍSF øll hesi árini, men alt fær ein enda, og tað fer hetta eisini. Um kommunulógin ikki loyvir mær at hava slíkt ólønt arbeiði við síðuna av borgarstjórastarvinum, so er einki at gera – tað má eg góðtaka, sigur hann.

Umframt Heðin Mortensen sita Sverre Midjord og Petur Elias Petersen í starvsnevndini hjá Ítróttarsambandinum. John Kjær er varamaður.